# HEILSANIR



**Góði Gaja**
Hjartaliga tillukku við 40 ára føðingardegnum í dag og túsund takk fyri at tú ert so góður við okkum. Tær allarbestu heilsanir frá
**John Ivar, Jónu, Símun Petur, Ólavur og Annu Mariu Heilsan er eisini frá mammu og babba**



**Elskaði Gaja**
Eg ynski tær hjartaliga tillukku við tí runda degnum og takk fyri tað tú ert fyri meg.
**Kærar heilsanir Elsebeth og Laisa**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum. Nú mugu tú og omma hava ein góðan túr. Takk fyri at tit bæði eru so góð við okkum.
**Heilsan Fríði og Heidi**



**Góðu tit bæði**
*Vit hesum báðum vilja takka,*
*tey mangt eitt spor hjá okkum hava traðka.*
*Tit manga tvøgu hava slitið,*
*tí einki mátti jú vera skitið.*
*Altíð klár við hjálpandi hond,*
*knýtti mangan vinarbond.*
*Vit takka fyri manga hugnaliga løtu,*
*og góðar søgur - onkur var úr Gøtu,*
*vónandi onkuntíð hyggja forbí,*
*so aftur vit síggjar tykkar fittu snýð.*
**Heilsan vit í F.T.S.**



**Góða elskaða Lis**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag. Jesus pápi gevi tær eina ljósa og góða framtíð. Vit elska teg so nógv.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða Marita**
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum. Nú ert tú blivin stór. Góða eydnu við honum sjálvum.
**Ynskja grannarnir**



**Góða fitta Lis**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 29. juni. Jesus pápi signi framtíð tína. Vit elska teg.
**Omma, abbi og mostir**



**Hey diddan**
Nú helt tú at tú slapp undan... Hjartaliga tillukku við 24 ára degnum. Alt tað besta.
**Heilsan AG**



**Góði elskaði babba**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum tann 24. juni. Vit elska teg.
**Ynskja Edit og mamma**


## Postgjaldsbroytingar

Við hesum verður sagt frá, at niðanfyri standandi postgjøld verða galdandi frá 2. august 2004:

### Brøv

Føroyar

| | A-brøv | B-brøv |
|---|---|---|
| - 20 g. | 5,50 kr. | 5,00 kr. |
| - 100 g. | 9,00 kr. | 8,50 kr. |
| - 250 g. | 14,00 kr. | 12,00 kr. |
| - 500 g. | 25,00 kr. | 21,00 kr. |
| - 1000 g. | 35,00 kr. | 30,00 kr. |
| - 2000 g. | 45,00 kr. | 40,00 kr. |

Europa
Íroknað Norðurlond

| | A-prioritaire | B-economique |
|---|---|---|
| - 20 g. | 7,50 kr. | 7,00 kr. |
| - 100 g. | 12,00 kr. | 10,00 kr. |
| - 250 g. | 25,00 kr. | 20,00 kr. |
| - 500 g. | 40,00 kr. | 30,00 kr. |
| - 1000 g. | 70,00 kr. | 50,00 kr. |
| - 2000 g. | 100,00 kr. | 80,00 kr. |

Onnur lond

| | A-prioritaire | B-economique |
|---|---|---|
| - 20 g. | 10,00 kr. | 9,00 kr. |
| - 100 g. | 20,00 kr. | 17,00 kr. |
| - 250 g. | 45,00 kr. | 35,00 kr. |
| - 500 g. | 90,00 kr. | 70,00 kr. |
| - 1000 g. | 150,00 kr. | 100,00 kr. |
| - 2000 g. | 250,00 kr. | 200,00 kr. |

### Pakkar

Føroyar

| | |
|---|---|
| - 5 kg. | 50,00 kr. |
| - 10 kg. | 60,00 kr. |
| - 20 kg. | 80,00 kr. |
| - 30 kg. | 100,00 kr. |
| > 30 kg. Grundgjald: | 100,00 kr. |
| Eyka fyri byrjað kg.: | 5,00 kr. |

Nýggjur postgjaldsfaldari verður borin øllum húskjum og postboksum beint fyri Ólavsøku

Postverk Føroya



Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!




# TILTØK

**Doulos**
**Týsdagin kl. 10.30 og 13.00: Trúboðanar ævintýr fyri børn:**
Øll børn í aldrinum 8-12 ár eru vælkomin umborð, har tit saman við manningi á Doulos fara á eina ferð kring heimin og fáa fyrstuhonds vitan um, hvat ein trúboðari er, og hvat hann ger. Meðan tit eru á »ferð«, kunnu foreldur tykkara vitja stóru bókasøluna.
**Týsdagin kl. 19.30: Menn tosa til menn:**
Nakrir av manningini á Doulos eru vertir við hetta serliga tiltak fyri menn. Hvussu klárar tú krøvini og trýstið, sum í dag verður sett til tað arbeiðið, menn gera, bæði burturi og heima? Hoyrið nøkur reiðilig og hent sjónarmið hesum viðvíkjandi frá manningini á Doulos.
*Opið er umborð fyri almenninginum mán.-leyg. kl. 10-22 og sunnudag kl. 14-22.*

**Samkoman Rhema**
Hóskvøldið kl. 20 Samkomufundur, kl. 11 Møti.
www.rhema.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Benny Blumensaat prest, í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Mánakvøldið 5. juli kl. 19.30 verður Marie Keevern frá Missiónsskipinum »Anastasis« í Mariukirkjuni. Hon fer at siga frá, um arbeiðið og uppgávurnar umborð á hospitalskipinum, »Anastasis« ið verður á Havnini tann 7.-15. juli 2004. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími, Opinberingin 4.
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Martin og Dagny Dam í Kaldbak.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Øssur Kjærbo, Niels Juul og Birgit syngja.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mánadag til hósdag kl. 17 Bøn.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti við luttøku av ungfólki úr Levende Ord í Bergen.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Ólavi Jacobsen – evnið: Nýtt lív í Jesusi, kl. 11.50 ABC »Grøðing við Jesu sárum« 1. partur við Sonna Djurhus. Kl. 18 Møti við Ólavi Jacobsen – evnið: Nýtt lív í Jesusi (framhald). Um tær tørvar forbøn ring 214067. www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími og bønarløta.

**Lívdin**
*Í Fimleikarahøllini*
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjuløta, kl. 11.10 ein steðgur við drekka.
Kl. 11.30 Tilbiðjanarmøti við talu, lovsongi og breyðbróting. Barnatiltak verður í Hoyvíkshøllini frá kl. 11.30-21.15. www.livdin.fo

**Haldórsvík**
Bønarmøti verður hjá Solveig og John Joensen í kvøld kl. 20, og útimøti kl. 21. Verið hjartaliga vælkomin á møti.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Undirvísing um dóp verður í kvøld kl. 19 við Pola Jacobsen.
Bønarmøti verður mikukvøldið kl. 19.30 og um viðrar verður útimøti á torginum kl. 20.30.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við ungdómi frá Levende Ord úr Bergen. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30, Klæmint Eliasen talar. Evnið: Brævið til samkomuna í Filadelfia (Op. 3:7-13). Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Mikudagin kl. 20 Bíbliutími við Hilmar Danielsen, Matt. 19.
Fríggjadagin kl. 22 Opið hús við teami frá Doulos.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 **Møti viðHanus Simonsen. Fólk frá Doulos vitja,** kl. 21 Ungdómsmøti, Fólk frá Doulos vitja.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Samkoman Malta Skagerak-fundirnir**
Cosmos Trawl, Østhavnen, Hirtshals. Fundirnir verða soleiðis: 8. juli og 23., 24. og 25. juli. Á fundunum 23.-25. juli luttaka ferðandi og onnur við vitnisburði og sangi. 5. august verður seinasti fundur. Allir fundirnir eru kl. 19.30. Aftaná fundirnar bjóða vit ein kaffimunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Tilhaldið verður stongt vegna umvæling frá:
**28. juni til 26. juli og frá 30. juli - 13. august.**
**Ólavsøkuframsýning verður í Tilhalhdlinum 28.-29. juli.**
**Brúðarmyndir 1919-1971. brúðarkjólar, fjarrit.**
**Søla: Drekkamunnur og drýlur í kjallaranum. Opið: kl. 15.00-19.00.**

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 30. juni***
Vit práta um farna árið, og hugna okkum. Hetta er seinasti dagur áðrenn summarfrítíðina. Tilhaldið fer í summarfrí 1. juli og opið verður aftur 1. september.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
**Summarfrí verður frá 28. juni til 6. september 2004. Gott summar ynskir Fløvin.**

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

## V4-dráttur
### í drátti nr. 1543
### 26. juni 2004

**Tølini:** 4 - 8 - 20 - 21 - 23 - 28 - 39 - 46 - 47 - 52 - 65 - 69 -70 - 75 - 86 - 93

**Ongin vinnari**
Vinningurin fluttur til næsta drátt.

**Eykavinningur**
Seðlarnir til dráttin í kvøld luttaka eisini í stóra Ólavsøkuspælinum, har vinningurin er kr. 100.000.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## BRÚDLEYP

Leygardagin 3. juli kl. 15.00 giftast í Saksunar kirkju, Joan Haraldsen, Sandavágur og Gunnfríður Dahl-Olsen, Saksun. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 16.30. Eftir kl. 20.00 er vælkomst heima í Saksun.

17. juli kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Nicoleta Radu, Buzau, Romenia og Øssur Hansen, Miðvágur. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 556491 ella 226190. Seinasta freist at tekna seg er 5. juli.

Leygardagin 17. juli giftast Charlotta Hentze, Saltangará og Remy Hansen, Nes. Vígslan verður í Berøa kl. 13.30. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu vera vinarliga biðin at siga frá áðrenn 2. juli á tlf. 447476, 220033 ella 509919.

Leygardagin 31. juli kl. 13.30 giftast í Berøa í Saltangará Joan Thune úr Runavík og Ólavur Justinussen úr Streymnesi. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 226434 og 226432. Seinasta freist at tekna seg er leygardagin 3. juli.

Leygardagin 7. august kl. 11.00 giftast í Skopunar kirkju Jóna Petra Thomsen, Skopun og Jóhan Mikkelsen, Sørvágur. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum Samljóð í Skopun kl. 20.00.
Teistin siglur úr skopun á Gomlurætt sunnumorgunin kl. 04.00.
Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 23. juli á tlf. 332312, 361575 ella 253001.

## KONFIRMATIÓN

4. juli konfirmerast í Vesturkirkjuni kl. 11.00 Dánjal Arge, sonur Dagfinn og Valborg Arge. Adr.: Jansstovugøta 7


## HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 29.06. | kl. 19:30 | Týsdagin | 29.06. | kl. 22:00 |
| Mikudagin | 30.06. | kl. 19:30 | Mikudagin | 30.06. | kl. 22:00 |
| Hósdagin | 01.07. | kl. 17:30 | Hósdagin | 01.07. | kl. 20:00 |




**Billettprísur: 70,- kr.**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 29.06. | kl. 18:30 | Mikudagin | 30.06. | kl. 18:30 |
| Hósdagin | 01.07. | kl. 18:30 | | | |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 29.06. | kl. 21:45 | Mikudagin | 30.06. | kl. 21:45 |
| Hósdagin | 01.07. | kl. 21:45 | *– Seinasta sýning* | | |

## KOMANDI FILMAR




**Undanfrumsýning**
Hósdagin 01.07. kl. 22:30




**Frumsýning**
Fríggjadagin 02.07. kl. 21:15 Fríggjadagin 02.07. kl. 23:30

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**